## FBI breyt lógina

Aftan á yvirgangsatsóknina at New York í 2001 valdi amerikanska samveldisløgreglan FBI at skráseta telefonsamrøður hjá túsundtals amerikanarum, sum kundu hava tilknýti til yvirgang. Nú hevur ein kanning hjá løgmálaráðnum avdúkað og staðfest, at FBI fór langt út um lógina, skrivar Washington Post. FBI-talskvinnan Valerie Caproni viðgongur í samrøðu við blaðið, at løgreglan skrásetti nógvar samrøður uttan at siga telefonfeløgunum frá, soleiðis sum lógin annars krevur. Hon sigur tó, at einki óndsinnað lá aftan fyri framferðina hjá FBI.



## Kom aftur í morgin

Gongst sum ætlað kemur íslendska bjargingarliðið, sum hevur verið í Haiti, aftur til Íslands í annaðkvøld. Íslendsku fjølmiðlarnir skriva, at uttanríkisráðið í Reykjavík hevur útvegað eitt flogfar frá felagnum Iceland Express til at flyta bjargingarliðið og tess útgerð heimaftur. Íslendska bjargingarliðið var tað fyrsta, sum kom til Haiti aftan á jarðskjálvtan, og tað vakti ans víða um heimin, at ein so fáment tjóð, sum harafturat er í djúpari kreppu, skuldi vera tann fyrsta at fara teimum neyðstøddu til hjálpar.

# Tjóðveldi hevur einki ímóti Merkinum

**Í gjár hekk Merkið á fyrsta sinni inni í tingsalinum, eftir at Løgtingið hevði samtykt, at so skuldi verða. Samtyktin var tó tepur, og uttan at Tjóðveldi tók undir við uppskotinum. Vit hava spurt hví Tjóðveldi atkvøddi ímóti uppskotinum**

MERKIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár hekk Merkið á fyrsta sinni inni í tingsalinum, eftir at Løgtingið tann 8. oktober í fjør samtykti eitt uppskot til samtyktar um, at Løgtingið tekur undir við, at Merkið skal virðast og hava hóskandi pláss í tingsalinum.

Sjálvstýrisflokkurin, sum átti uppskotið, segði í viðmerkingunum til uppruna-uppskotið, at »Sjálvstýrisflokkurin vil við uppskotinum vísa Merkinum og tjóðini, ið tað umboðar, størri virðing og meiri ásýniligt pláss í tingstarvinum.«

Men tá Løgtingið samtykti uppskotið við bert 11 atkvøðum fyri, 8 atkvøðum ímóti og 5 blonkum, var tað uttan stuðul frá Tjóðveldi, sum fólk møguliga høvdu hildið var náttúrligt.

Sjúrður Skaale greiðir frá, at ein av orsøkunum til, at fleiri helst atkvøddu blankt, er at handa orðingin við, at Løgtingið tekur undir við, at Merkið skal virðast og hava hóskandi pláss í tingsalinum, sum er eitt sindur lumpislig, tí um tingfólk ikki tóku undir við uppskotinum, so kundi tað sæð út sum at tey ikki tóku undir við uppskotinum.

- Tað eru eisini nøkur lond, sum allatíð hava tørv á at skapa og styrkja tjóðarsamleikan. Tak eitt nú USA, sum er sett saman av so ótrúliga nøgvum fólkasløgum, og sum er í stríð við onnur lond, tey hava stóran tørv á at minna fólk á, at tey eru ein tjóð og at tey mugu standa saman. Eisini hjá eitt nú Ísrael er tað neyðugt at minna fólk á tjóðarsamleikan og at standa saman. Henda tørvin hava vit jú ikki í Føroyum. Her er tað eyðsýnt, hvør er útlendingur og hvør er føroyingur, og føroyingar hava ein sterkan tjóðarsamleika, greiðir Sjúrður Skaale frá.



*Merkið hevði á fyrsta sinni í gjár fingið eitt »virðiligt pláss« í Tingsalinum. Men hóast fleiri atkvøddu ímóti uppskotinum, merkir tað ikki at tey ikki virða Merkið, sigur Sjúrður Skaale, tingmaður hjá Tjóðveldi*

### Uttanfyri siðvenjuna

Sjúrður Skaale vísir eisini á, at tað heldur ikki er siðvenja í Føroyum at flagga inni og nýta Merkið í gerandisdegnum.

- Siðvenjan í Føroyum hevur verið, at Merkið verður nýtt í samband við hátíðardagar. Merkið hevur veittrað á Tingvøllinum og í Tinganesi tá hátíðarhald og hátíðardagar eru, og tað er í samsvar við siðvenjuna, sum hevur verið í Føroyum, sigur Sjúrður Skaale.

### Formansskapurin skuldi hava avgerðina

Tá uppskotið varð fyri í Mentanarnevndini, varð eitt broytingaruppskot sett fram av meirilutanum, Jógvan á Lakjuni, Óli Breckmann, Marjus Dam og Sámal Petur í Grund, sum strikaði orðingina við, at Merkið skal virðast, soleiðis at tað bert stóð, at Merkið skuldi hava hóskandi pláss í Tingsalinum.

Minnilutin í Mentanarnevndini, Magni Laksáfoss, Eyðgunn Samuelsen og Sjúrður Skaale, søgdu í sínum viðmerkingum til uppskotið, at hann ikki metti, at tað eigur at vera upp til eina støðutakan í Løgtinginum, hvørt Merkið skal hanga í tingsalinum ella ikki, og at hetta var ein spurningur, sum formansskapurin eigur taka støðu til.

Sjúrður Skaale greiðir frá, at tá støða skuldi takast til uppskotini, kom upprunauppskotið til atkvøðugreiðslu fyrst og varð samtykt.

- Varð hin orðingin komin til atkvøðugreiðslu fyrst, so ivist eg ikki í, at tað uppskotið hevði verið samtykt í staðin, sigur Sjúrður Skaale.

Sjúrður Skaale vísir á, at hóast Tjóðveldi og onnur ikki tók undir við at samtykkja, at Merkið skal hanga í tingsalinum, so fatar alt Tingið Merkið, sum at tað er ímyndin av tjóðarsamleikanum, og at tað er eingin munur á flokkunum í so máta.

# Útflutningurin av fiski minkaði eitt prosent

**Uppgerðin hjá Hagstovu Føroya av útflutninginum fyrstu 11 mánaðirnar av 2009 vísur, at vit útfluttu fisk fyri áleið sama krónutal sum í 2008**

ÚTFLUTNINGUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Uppgerðin hjá Hagstovu Føroya av útflutninginum fyrstu 11 mánaðirnar av 2009 vísur, at vit útfluttu fisk fyri áleið sama krónutal sum í 2008.



*Útflutningurin av fiskavørum fyrstu 11 mánaðirnar í 2009 minkaði eitt prosent samanborið við 2008*
*Savnsmynd*

Sum vit eisini hava hoyrt fleiri fer seinastu tíðina, er tað serliga alivinnan sum hevur økt um útflutningsvirðið, og er tað útflutningurin av botnfiski, sum í krónum er minkaður nógv.

Í 2008 útfluttu vit frá januar til november fyri 1.383 milliónir krónur, meðan vit í sama tíðarskeiði í 2009 útfluttu fyri 1.161 milliónir krónur av botnfiski. Útflutningurin av uppisjóvarfiski minkaði við 80 milliónum krónum, og útflutningurin av øðrum fiski og fiskaúrdráttum minkaði við 71 milliónum krónum.

Alivinnan hevur hinvegin havt tað framúr gott í fjør, og er tað orsøkin til, at samlaða útflutningsvirðið av fiski var áleið tað sama í 2009 sum í 2008.

Vit útfluttu fyri 893 milliónir av alifiski í 2008 og 1.271 milliónir í 2009 - svarandi til ein útflutningsvøkstur á 378 milliónir krónur.

Samlað útfluttu vit fyri 3,7 milliardir, smáar 400 milliónir minni enn í 2008.

Hetta skyldast at vit seldu skip av landinum fyri 600 milliónir í 2008 móti 200 milliónir í fjør. Tilsamans minkaði fiskavøruútflutningurin fyrstu 11 mánaðirnar í 2009, samanborið við 2008, við 42 milliónum krónum, svarandi til 1 prosent.